Álit

í

løgtingsmáli nr. 36/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn
(Fíggjarliga heimildin til at gera antikvariska serskipan í Koltri verður longd til 2025)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur lagt málið fram tann 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð tann 9. oktober 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Tjóðsavnið, Mentamálaráðið og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Við løgtingsmáli nr. 67/2014 varð løgtingslóg um Búnaðargrunn broytt soleiðis, at 5,0 mió. kr. av innistandandi upphæddini pr. 1. januar 2013, markað til Royndarstøðina í Hoyvík, skuldu brúkast til eina antikvariska serskipan fyri Koltur.

Henda serskipan skuldi gerast í árunum 2014-2020. Av samlaðu játtanini upp á 5,0 mió. kr. eru uml. 2,1 mió. kr. eftir. Komið er ikki á mál við at gera hesa antikvarisku serskipan, og neyðugt er tí at leingja tíðarskeiðið, ið er ásett í § 6 c, frá 2020 til 2025, so heimild er at brúka ta upphæddina, ið eftir er.

Vinnunevndin hevur í sambandi við viðgerðina av málinum frá Tjóðsavninum fingið eina framløgu av spennandi Koltursverkætlanini. Talan er um eitt livandi mentanarligt og søguligt savn, sum millum annað fevnir um landbúnaðarsøgu, bátasmíð og annað, sum verið hevur í Koltri. Samstundis verður seyðurin tikin av í parti av oynni, so náttúra og lendi kann mennast uttan seyðabit. Náttúrutengd gransking er eisini sentralur partur av Koltursverkætlanini.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 27. oktober 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	